# Skaðar ikki at geva øllum full mannarættindi



BOGI DÁNIAL-SON DAVIDSEN

**-Tað vil á ongan hátt skaða eitt fólk at geva øllum full mannarættindi, eisini samkyndum. Tvørturímóti verður lívið lættari fyri øll, tí tá vísa vit tolsemi, og vit geva møguleika fyri og góðtaka, at vit menniskju er sera fjølbroytt, og at vit ikki bert eru ”rein” á ein hvønn hátt. Tað verður lættari hjá foreldrum, systkjum, vinfólki og fjøldini sum heild at liva við segði Bogi Davidsen m.a. tá hann møtti í Rættarnevndini í morgun**



*Bogi Davidsen saman við øðrum av uppskotsstillaranum, Finni Helmsdal, løgtings Tjóðveldisfloksins*

*Sonja Jógvansdóttir og Bogi Davicsen, sum bæði eru samkynd og búgva í Danmark, møttu í Rættarnevndini í morgun*

Rættarnevnd løgtingsins er farið undir hoyring í sambandi við uppskotið um broyting av lóg 266B, sum fevnir um bann móti mismuni mótvegis minnilutabólkum - eisini samkyndum. Millum tey, sum vórðu hoyrd í morgun, var eisini føroyski samkyndi læknin, Bogi Davidsen. Og niðanfyri prenta vit røðuna hann helt fyri limunum í Rættarnevndini:

Tala í Rættarnevndini í Føroya Løgtingi t. 27.11.06 við evninum lóg um broyting av lóg 266B, sum fevnir um bann móti mismuni mótvegis minnilutabólkum - eisini samkyndum.

Góðu løgtingslimir, limir í rættarnevndini og Føroya fólk.

Eg eri ómetaliga glaður fyri, at vit í Føroyum eru komin so langt nú, at vit nú kunna tosa alment um tey samkyndu, eisini á ein siðiligan hátt, og at vit kjakast um at geva okkum eina lóg, sum verjir ávísar minnilutabólkar, m.a. eisini tey samkyndu.

Kjakið er sera umfatandi, og eru fólk bæði fyri og ímóti, sum tað eigur at vera í einum demokratiskum samfelagi. Samstundis verður eisini nortið við mangt og hvat, sum ikki júst hevur nakað við hetta lógaruppskot at gera. Tíanverri er málburðurin í talu og skrivt av og á stak ljótur. Vanlig fólk, um tey eru fyri ella ímóti, mugu øtast við. Tað man ikki vera neyðugt hjá mær at koma við dømum. Tað eru tí ikki vit samkyndu, sum gera Føroyum kend á ein ódámligan hátt.

Eg haldi, at vit kunna bólka áskoðaninar upp soleiðis:

ein bólkur er fyri lógaruppskotinum

ein bólkur er móti

ein bólkur er í iva um lógaruppskotið.

Okkara mál er, at vit ynskja at styrkja ein minniluta bólk, nevniliga tey samkyndu.

Í samstarvi við útheimin hava tey samkyndu ment seg, serliga síðani Stonewall stríðið í New York í 1969, har vit stríddust móti tí almenna áganginum - eisini politivaldinum. Tá kom felagsskapurin ”Gay Liberation Front”, sum síðani áhaldandi hevur arbeitt í teimum flestu vesturlondum fyri okkara søk. Tað styrkti eisini arbeiðið í Norðurlondum, har ”Forbundet af 1948”, seinri í Danmark kallað ”Forbundet for bøsser og lesbiske” hevur gjørt eitt munagott arbeiði fyri okkum síðani 1948.

Vit eru komin langt ávegis. Vit eru nú bæði glað fyri okkara lív og errin av at vera og eisini liva sum samkynd við rættindum, sum økjast dag um dag, men sjálvandi eisini við teimum skyldum, sum samfelagið setur hvørjum einstakum borgara og undir fullari ábyrgd.

Vit samkyndu gleðast yvir, at vit ikki longur verða tagd burtur. Vit koma áhaldandi fram við okkara ynskjum, sum eru, at okkara lív sum menniskju skal vera sum hjá hinkyndum heima í Føroyum, á bygd og í bý, eins og uttanlands, mennandi og spennandi frá barnsbeini av og til vit eldast, og at vit kunnu liva í friði og gleði saman við foreldrum, systkjum, familju, vinfólkum og fólki sum heild.

Sjálvandi eru vit samkyndu heima í Føroyum eins og fjøldin vard móti likamligum ágangi í revsilógini og móti happing av einum og hvørjum slag og niðring í injuriulógini. Tað skal tað ikki vera nakar ivi um. Men tær lógirnar verða bert nýttar, tá støðan er komin alt ov langt út yvir vanligt sámuligt lív, og tað krevur persónliga styrki hjá einstaklinginum til at ákæra.

At góðtaka hesa lógina heima í Føroyum fer at hava somu fylgjur heima í Føroyum sum uttanlands, men fer ivaleyst at taka longri tíð. Vit vóna, at um lógin verður góðtikin, at tað serliga fer at styrkja støðuna hjá ungum, sum eru samkynd, og sum síðani eisini velja at liva sum samkynd.

Tit, sum ikki eru samkynd vita ikki, hvussu tað kennist sum ungur at hoyra niðrandi talu ella umtalu, og hvussu tað ávirkar sinnið. Mong koma tíanverri ikki fyri seg, liva í loyndum við sínum kenslum og tonkum, summi gerast døpurhugað, nøkur velja at taka lívið av sær, men vónandi verður hetta alt færri. Tí vit er nú ment so mikið uttanlands og vónandi eisini heima, soleiðis at lívið gerst so líðandi lættari og lættari at liva.

Tann ljóti málbururin stuðlar eisini teimum, sum av eini hvørjari orsøk, ikki kunna góðtaka okkum. Tað kann kanska vera ein orsøk til, at fimm mans leypa á tann unga samkynda Rasmus Rasmussen, likamsliga løsta hann og sálarliga pína hann, so hann enn liggur á sálardeildini, og sum eg skilji nú hevur sagt seg úr tónleikabólkinum, sum hevur glett nógv her heima.

Tað, vit samkyndu kunna velja, er at liva sum okkara náttúra sigur okkum, men vit hava onga ávirkan á, hví vit eru vorðin samkynd, og tað hevur heldur ikki tann stóra týdningin fyri okkum, um vit eru tað av genetiskara orsøk ella vegna okkara umhvørvið, sum mong hava so nógvan áhuga fyri at vita. Hví?

Tað, vit kunna velja og vónandi eisini velja, er at liva soleiðis, sum vit sjálvi kenna, at vit eru. Rólant Samuelsen, sáli, úr Havnini segði tað so greitt í samtalu í Oyggjaskeggjanum í 1975, og hann var eisini eitt vanligt kirkjufólk og var trúgvandi. Hann segði: ”Hann, Harrin, hevur eisini skapt meg.”

Um vit endiliga skula tosa um synd, so er tað fyri okkum ikki ein synd at liva, sum mann er, men tvørturímóti. Men undir ábyrgd yvir fyri sær sjálvum og samfelaganum. Syndin er ikki at liva, sum mann er, og ein onnur synd er at forða øðrum í at vera og liva, sum tey eru – innan samfelagsins lógarkarmar.

Tað er umráðandi at búgva í góðum umhvørvi, at vera elskaður og góðtikin serliga av foreldrum, systkjum, vinum, men eisini av fjøldini. Tí eiga vit at fáa hesa lóg. Vónandi fer tað at føra við sær, at málburðurin verður soleiðis, at vit sleppa undan hesum ljóta prátinum og tí niðrandi taluni, uttan mun til um lógin verður viðtikin ella ei á hesum sinni. Hon skal uttan iva verða tað seinri.

Grundarlagið undir okkara samfelagi í Føroyum og í Vesturheiminum byggir fyri ein stóran part á tað kristna grundarlagið, sum nógv samkynd eisini byggja teirra lív á.

Fyri tey flestu her heima í Føroyum hevur tað verið ein trupulleiki, at menn sum løgtingslimirnir Jenis av Rana, Gerhard Lognberg og Óli Breckmann og so hvalvíkspresturin hava sagt, hvussu Bíblian eigur at tulkast, og hvussu tað skal atkvøðast. Vanlig hampafólk hava ongan vanligan prest havt úr fólkakirjuni at stuðla seg til. Tað er tí ómetaliga gleðiligt at lesa greinina hjá prestinum, Sonju Klein, t. 24. 11., har hon stuðlar okkum so dyggiliga út frá kærleiksboðskapinum. Tað kann vera, at nøkur ivandi nú fara at hugsa seg umaftur bæði á tingi og uttanfyri.

Tíðarinnar tonn hevur havt við sær stórar broytingar í samfelagnum ígjøgnum øldir, tí vit menniskju hava havt høvi til at tulka tekst og orð og eisini andan í orðunum, og ikki bert stava okkum ígjøgnum orð fyri orð.

Til dømis hava tey litaðu í USA og Suðurafrika og aðra staðir fingið lógir ímóti rasismu. Vanlig fólk hava fingið atkvøðurætt, og ikki bert harrafólk ella tey ríku ráða. Einligar mammur og teirra børn hava nú á døgum fullan líkarætt, men soleiðis hevur tíanverri ikki altíð verið. Tað mugu enn nógv eldri enn minnast. At kvinnur hava bæði fingið atkvøðurætt og lóg, sum gevur teimum líkarætt við menninar, soleiðis at vit nú eisini her heima í Føroyum kunnu hava kvinnur sum prestar, løgtingslimir, og eisini hava vit havt eina kvinnu sum løgmann. Men tað hevur verið eitt áralangt stríð, sum nú lutvíst er vunnið. Eg kann ikki ímynda mær, at tann føroyska kvinnan nakrantíð fer at góðtaka at venda aftur til ta gomlu tíðina, har maðurin ráddi, bert tí hann var maður. Tað er at fegnast um

Tí berjast vit samkyndu á sama hátt og koma áhaldandi at gera tað.

Vit eru ovurfegin um stuðulin frá løgmanni Jóannesi Eidesgaard, Annitu av Fríðriksmørk, Finni Helmsdal, Andreasi Petersen, Pouli Michelsen og øðrum tinglimum.

Vit eru ikki úti eftir at háða okkara føðiland Føroyar, sum vit elska eins nógv og onnur, ei heldur at happa og háða tey, sum eru ímóti hesi lóg, men vit siga okkara áskoðan móti teirra áskoðan, sum eisini er okkara sjálvsagdi rættur í einum demokratiskum samfelagi.

At góðtaka hesa lóg hevur stóran signaltýdning fyri okkum samkyndu, serliga teimum ungu, okkara familjum, vinfólki og fjøldini sum heild, heima og uttanlands.

Tað vil á ongan hátt skaða eitt fólk at geva øllum full mannarættindi, eisini samkyndum. Tvørturímóti verður lívið lættari fyri øll, tí tá vísa vit tolsemi, og vit geva møguleika fyri og góðtaka, at vit mennuskju er sera fjølbroytt, og at vit ikki bert eru ”rein” á ein hvønn hátt. Tað verður lættari hjá foreldrum, systkjum, vinfólki og fjøldini sum heild at liva við.

Tí vil eg enn eina ferð eins og fyrr í sjónvarpi, útvarpi, bløðum, í Løgtinginum, í Landsstýrinum, í grundlógarnevndini/stjórnmálanevndini og nú her í Rættarnevndini tosa og arbeiða fyri, at lógin verður góðtikin. Tað verður teimum løgtingslimum, sum atkvøða fyri henni til heiðurs og okkum minnilutum og fjøldini til gagns. Tá kunna vit gleðast yvir, at vit kunnu búgva í Føroyum, og at vit koma heimaftur ella bert vitja heima í Føroyum.

Um so er, at onkur vil spyrja meg um okkurt, fari eg at royna at svara so mikið, sum eg eri førur fyri, so trúliga og erliga eg kann, uttan at eg goymi tað, sum eg og vit samkyndu ynskja okkum í framtíðini. Vónandi kann eg eisini svara teimum ivandi um hetta mál, tí nógv er ógreitt - eisini fyri okkum.

Loksins vil eg minna á eina yrking hjá Hans Andreas Djurhuus, sum eg longu havi nevnt fyrr í bløðunum: ”Tey standa og vagga.” Har stendur:

*hvønn vøkstur Gud hevur fagnað,*
*og hvør eigur lívsins rætt.*

Yrkingin og andin í orðunum eru ikki ein spurningur, men ein staðfesting.

Takk fyri orðið.